# Gøtudalur verður handilsmiðdepil

**Ætlanir eru um at gera Gøtudal til nýggjan handilsmiðdepil í meginøkinum við fleiri handilsmiðdeplum og vinnufyritøkum**

HANDILSLÍV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað eru ikki hissini ætlanir, ið ymisk vinnulívsfólk hava fyri Gøtudal. Eitt nú hava teir, ið standa aftan fyri handilin hjá Haraldsen í Fuglafirði og PW í Norðragøtu, keypt bygningin hjá Aluplast beint eystan fyri niðankoyringina til Leirvíkstunnilin, og sum skilst letur nýggjur matvøruhandil upp har.



*Eigararnir av handlinum hjá Haraldsen í Fuglafirði og PW Kolonial í Norðragøtu hava í felag keypt gamla bygningin hjá Aluplast, og sum skilst er ætlanin at lata nýggjan og stóran matvøruhandil upp í bygninginum*

*Mynd: Jonhard Hammer*

## Eisini nýbygging

Hetta merkir sjálvsagt, at Aluplast skal hava nýggj hølir, og hesar ætlanir eru eisini komnar væl ávegis. Fyritøkan hevur fingið fatur á einum grundstykki nakað vestan fyri Leirvíksvegin, og har fer Aluplast at byggja nýggjan bygning til alt virksemi hjá fyritøkuni. Men Aluplast verður væntandi ikki einsamallir vestan fyri Leirvíksvegin. Nakrir vinnulívsmenn hava fingið fatur á stykkinum, sum liggur beint upp at tunnilsvegnum, og har er ætlanin at byggja eina nýggja handilsmiðstøð við fleiri handlum.

Hetta merkir sostatt, at tveir nýggir bygningar vestan fyri tunnilsvegin, men eystan fyri verður eisini víðkað um virksemi.

Sum áðurnevnt hevur Samkeyp ognað sær bygningin hjá Aluplast, men beint við síðuna av hesum bygningi eru eisini ein sethús. Hesi sethús hevur Fastognarfelagið fingið hendur á, og sum skilst eru ætlanir um at byggja enn ein bygning á stykkinum, sum hoyrir til sethúsini. Hvat slag av virksemi, ið Fastognarfelagið hevur ætlanir um í Gøtudali, er tó ikki greitt enn.

## Kapping um kundarnar

Tað man verða lítið at ivast í, at tað er Norðoyartunnilin, ið hevur við sær, at tað er blivin stórur áhugi fyri at gera Gøtudal til nýggjan handilsmiðdepil í meginøkinum.

Øll ferðsla til og úr Norðoyggjum fer beint gjøgnum økið, og harafturat er stutt hjá flestøllum eysturoyingum at koyra inn til Gøtudal.

Nær møguleiki verður fyri at fara til handils í Gøtudali, er tó ikki greitt enn, men sum skilst hava Samkeyp og Aluplast gjørt eina avtalu um, at Samkeyp yvirtekur gamla bygningin um eitt ár.



*Tað er her vestan fyri tunnilsvegin til Leirvíkar, at ætlanin er at byggja eina nýggja handilsmiðstøð við alskyns handlum. Longur vesturi skal Aluplast eisini byggja sær ein nýggjan bygning*

*Mynd: Jonhard Hammer*

# Lá lívleysur á sjónum

**Týskvøldið var ein 87 ára gamal maður funnin lívleysur á sjónum beint við felagshølini hjá Havnar Róðrarfelag**

BJARGING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*




*Bæði løgregla og sjúkrabilur vóru skjót á staðnum, tá ið tann 87 ára gamli maðurin bleiv funnin lívleysur á sjónum uttan fyri dráttin hjá Havnar Róðrarfelag týskvøldið*

*mynd: www.ansni.fo*

Klokkan var farin av níggju, tá ið alarmsentralurin fekk fráboðan um, at ein maður lá lívleysur á sjónum beint uttan fyri bátadráttin hjá Havnar Róðrarfelag í Álakeri. Bæði sjúkrabilur og løgregla vóru skjótt á staðnum.

## Vaknaði við aftur í sjúkrabilinum

Vitnir, sum Sosialurin hevur tosað við, greiða frá, at menn, ið vóru úti og róðu, høvdu lagt til merkis ein mann, ið gekk og spákaði í grótkastinum í Álakeri. Nakað seinni verður borið eyga við lívleysa mannin á sjónum, og tveir mans vóru skjótir at flota ein bát og rógva teir fáu minuttirnar út eftir manninum.

Til alla lukku eru tveir mans, ið rógva við áttamannafarinum hjá Havnar Róðrarfelag, Ørvi, og sum vóru á staðnum, læknar, og teir fóru beinan vegin undir at arbeiða upp á mannin.

Maðurin bleiv í skundi fluttur við sjúkrabili stutta teinin á sjúkrahúsið, og ávegis í sjúkrabilinum vaknaði maðurin við aftur og spýði nógvan sjógv upp, upplýsir vakthavandi á politistøðini í Havn.

Vakthavandi upplýsir eisini, at enn er ógreitt, hví 87 ára gamli maðurin endaði á sjónum.